(2)

**Kristianna Larsen á Lofti**

**Fra:** Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
**Sendt:** 11. februar 2019 23:08
**Til:** Petur Joensen
**Emne:** VS: Uppskot um eltrygd til hoyringar

Góðan dagin Petur Joensen,

Sum eg skilji á tær í telefonsamrøðunum í dag, so liggur ikki fyri at geva okkum longda freist fyri at gera viðmerkingar til lógaruppskotið um eltrygd.

Í hoyringsskrivi tykkara frá 29. januar 2019 verður m.a. sagt, at:

*"Endamálið við uppskotinum er, at reglurnar bæði í sjálvari lógini og í nýggju kunngerðunum verða einfaldari og nútímansgjørdar, fyri at tryggja eina lóggávu við rúmd fyri tøkniligu menningini, samstundis sum tað verður tryggjað, at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar hava eitt trygdarstøði, sum ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.*

*Lógaruppskotið kemur í staðin fyri verandi sterkstreymslóg og inniheldur nútímansgerð av teknisku reglunum, sum í dag eru í sterkstreymsreglugerðini, fyri í størri mun at nýta evropiskar og altjóða standardir.*

*Ætlanin er við lógaruppskotinum at geva innleggingarfyritøkunum størri frælsi við annaðhvørt at gera arbeiðið við t.d. eini elektriskari innlegging eftir einum galdandi evropiskum ella altjóða standardi, ella at gera tað á ein hátt, sum lýkur lógarinnar krav til trygd.*

*Endamálið er eisini at dagføra lóggávuna fyri at gera bygnaðin av regluverkinum viðvíkjandi fyrisitingini av lóggávuni einfaldari og at gera reglurnar greiðari við at seta fyrisitingarligar reglur í gildi í staðin fyri galdandi, sum eru fyribils í gildi, til tær vera avloystar av nýggjum reglum.*

*Harumframt er endamálið við uppskotinum at fáa umsitingina av lógini í eina meira skipaða og trygga legu soleiðis. Nýggju reglurnar eiga framvegis at byggja á evropiskar og altjóða standardir fyri at halda eitt høgt eltrygdarstøði."*

Fyrst er at siga, at vit eru ónøgd við, at tit geva okkum so stutta hoyringsfreist sum bert 10 yrkadagar.

Fyri okkum at síggja er talan um eina rammulóg, har m.a. verður heimilað landsstýrimanninum at leggja uppgávur yvir til SEV. Úr viðmerkingunum til uppskotið verður endurgivið: *"Eftir uppskotinum verða eftirlitsuppgávurnar hjá SEV víðkaðar við tað at SEV, umframt at hava eftirlit við nýggjum innleggingum, skal hava praktiska eftirlitið við øllum elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum, undantikið útbúnanaði og innleggingum hjá SEV, og við øllum elektriskum tilfari."*

Eisini er ásett í lógaruppskotinum at SEV skal rinda allar útreiðslur av umsitingini av lógini, herundir av virkseminum hjá Elnevndini.

Upplýsast kann, at í 2011 arbeiddi Elnevndin og SEV í felag saman við Vinnumálaráðnum við at dagføra hetta virkisøkið. Leysliga bleiv tá mett, at hetta fór í minsta lagi at kosta 7,4 mió.kr. árliga. Tá vóru hvørki økini ognartøka (Landsverk) ella Maskindirektivið (Arbeiðseftirlitið) tikin við.

Enn er tað bert uppskot til lógartekst, sum er orðaður. Allar kunngerðirnar, har gingið verður út frá, at samlaða virkisøkið verður lýst, mangla. Tí ber ikki til hjá SEV at gera sær eina meting av vavinum av uppgávunum og harvið gera sær eina mynd av hvussu hetta skal skipast og hvat hetta fer at kosta. Bæði ófullfíggjaða upplýsingargrundarlagið og manglandi viðgerðartíð ger, at tað hvørki hjá leiðslu og nevnd hevur borið til at viðgera málið.

Tað er torført at síggja, at nakar hevur yvirblikk yvir hvat skal henda á økinum og enn minni hvat hetta kemur at kosta.

Sambært lógaruppskotinum kemur lógin í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, men fær hon fyrst virknað frá 1. januar 2020. Út frá hesum skilja vit ikki, at tað er neyðugt at skunda lógaruppskotið ígjøgnum.

Mælt verður til, at arbeitt verður víðari við verandi lógaruppskoti og hartil hoyrandi kunngerðum v.m., soleiðis at tað ber til at viðgera og taka støðu til málið á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi. Vit bjóða okkum fram at luttaka í hesum arbeiði á ein konstruktivan og skjótan hátt.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV
Hákun Djurhuus

**Fra:** Hákun Djurhuus
**Sendt:** 8. februar 2019 11:18
**Til:** Petur Joensen (petur.joensen@himr.fo) <petur.joensen@himr.fo>
**Emne:** VS: Uppskot um eltrygd til hoyringar

Góðan dagin Petur,

Vísi til samrøðu okkara fyri løtu síðani. Í fyrsta umfari er telduposturin sendur skeivt til sev@sev.fo, hann skuldi verið farin til tín.

Hetta er so umbøn okkara um leinging av freistini. Sum vit tosaðu um, so gera manglandi kunngerðirnar á økinum tað ógjørligt hjá okkum at meta um arbeiðsbyrðuna, sum verður løgd á SEV.

Vinalig heilsan
Hákun

**Fra:** Hákun Djurhuus
**Sendt:** 5. februar 2019 22:12
**Til:** SEV <sev@sev.fo>
**Emne:** SV: Uppskot um eltrygd til hoyringar

Góðan dagin Petur,

Vit fara við hesum um at biðja um longda freist. Hetta er eitt vítt fevnandi virkisøkið, ein stór broyting hvat SEV viðvíkur og nevndin í SEV eigur eisini at viðgera hetta. Nevndarfundur er aftur seinast í februar, so gott er, um freisting kann fara inn í mars mánað.

Vinalig heilsan
Hákun

**Fra:** SEV <sev@sev.fo>
**Sendt:** 29. januar 2019 08:03
**Til:** Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>; Bogi Bendtsen <bb@sev.fo>; Jón Nielsen <jn@sev.fo>; Heri Mortensen <hmo@sev.fo>
**Emne:** VS: Uppskot um eltrygd til hoyringar

**Fra:** Petur Joensen <Petur.Joensen@himr.fo>
**Sendt:** 28. januar 2019 18:03
**Til:** SEV <sev@sev.fo>
**Emne:** Uppskot um eltrygd til hoyringar

SEV,

Viðheft er uppskot til løgtingslóg um eltrygd til hoyringar.
Uppskotið verður rættlisið, so neyðugt er ikki at gera viðmerkingar tí viðvíkjandi.

Freistin at lata viðmerkingar er 11. februar 2019.

Vinaliga

Petur Joensen

Ráðgevi • Orkumál og Búskaparmál

Heilsu- og Innlendismálaráðið/
Ministry of Health and the Interior
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734016
Petur.joensen@himr.fo • www.himr.fo

VERIÐ VARIN: Hesin teldupostur kemur uttani frá til SEV. Ikki trýsta á leinkjur ella opna viðlagdar fílir uttan so, at tú kennir sendara og veit, at innihaldið er trygt.